# E - og tónleikurin



**Eyðun Nolsøe, tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja. Pápi mín spældi bæði violin og banjo. Umframt tað var guitari eisini í húsinum, frá eg var heilt lítil, tann fyrsta átti systur mín Ingvør vist.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Ja eg spæli guitar og syngi. Eg spældi eisini violin, frá eg var 11 til 16, men tað var ikki líka cool sum at standa á pallinum við eini guitar og syngja protestsangir.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Ja, for ólukkan, gera ikki øll tað?

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja tað havi eg droymt um. Eg havi eisini livað sum tónleikari í fleiri umførum.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Ein torførur spurningur. Sjálvandi hevði eg ikki siglt av uttan tónleik, men tilveran hevdi verið eina dimensión fátækari. Tónleikur er ein natúrligur partur av mínum gerandisdegi.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Eg veit ikki, eini 2-3-400 stk.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Eg havi fleiri yndisfløgur. Skuldi eg nevnt eina burturúr kundi tað verið »Joshua Tree« hjá U2.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Eina James Last fløgu við sukursøtum versiónum av evergreens.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– »Ingen regning« hjá Peter Belli er ræðuligur.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– »Angels« hjá Robbie William.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Eric Clapton er eitt gott boð.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Góðan rock ella væl framleiddan pop tónleik - bara ikki tungan sálmasang at vakna til!

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Eg blívi ikki í ringum lag av nøkrum tónleiki, tað skal meira til enn tað.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– »You rock my world« við Michael Jackson.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– »Í bø eg gangi«.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Torført. Eg sang kór í fyrsta studiosanginum hjá Enekk »Eru vit til«, tað er ein deiligur sangur, haldi eg.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– »Still haven't found what I'm looking for« hjá U2 við einum rock orkestri.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Kanska Peter Gabriel á Roskilde fagnaðinum 1995.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Sir Paul McCartney.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Johan Jacobsen, johan@sosialurin.fo
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Regn og stormur í Umm Al-Tuyur

Nú, í síðstu vikuni av januarmánaðinum 2004, liggur kavin yvir størsta partin av Danmark. Úr erva varð ikki gjørt nakað serligt burturúr - eingin vindur ella rok - kavaflykrurnar duttu spakuliga niður - stille og roligt - sum mann so ofta tekur til yviri í Jyllandi. Men hetta við veðrinum er lítið nýtt við, sum so.

Tó, fyri einari viku síðan, var stormveður yvir miðeysturøkið. Ein av vinmonnum mínum, sum í løtuni er búsitandi í Damaskus í Sýria, fekk tað hugskotið at fara á ein hugnaligan vikuskiftistúr til strandabygdina Umm Al-Tuyur (Fuglanna Móðir), ið liggur ímóti turkiska markinum. Í hesum økinum tosa fólk arabiskt (sýriskdialekt) og so eisini eldra málið, ið stavar frá tí gamla Turkmenistan. Hesin túrur varð gjørdur fyri at sleppa burtur frá kaldara januar-veðrinum inni á sýriska meginlandinum.

Sjálvt um hetta ikki endiliga eydnaðist so væl, eftir sum tað dagin eftir bleiv oysandi regn og stormur, so var tað deiliga undirhaldandi at lesa túrfrágreiðingina. Við í ferðalagnum úr Damaskus var konan, svigermamma, fasturin og lítlasystir konuna. Her møttu tey m.ø. tí lokala, unga og sera prátingarsinnaða Nader, sum fekk eitt gott eyga á 18 ára gomlu lítlusystrini - uttan iva var hetta orsøkin til alt prátið. Eftir at hava staðfest at mongolarnir fyri eini 700 árum síðani herjaðu økið, og broyttu blóðlinjuna, skrivar danski vinmaðurin, um hendan unga lívliga og flirtrandi mannin: "Og hvordan flirter så Djengis Khan afkom? De bralrer dig ørerne af med jagthistorier, fortæller om dengang de fangede falke og ørne i bjergene med de bare næver. De kommer med friskfanget fisk klokken ni om morgenen, med et kækt jægersmil i mundvigen."

Egyptaland slapp heldur ikki undan ringum veðri, sagt varð m.a. frá ringum sandstormi. Og júst í hesum døgum fór ein FIFA-sendinevnd úr Egyptalandi, eftir at hava verið har í eina góða viku. FIFA metir í hesum døgum um umsøknir frá umsøkjarum til at vera vertir fyri HM-2010. Í seinastu útgávuni av stóra egyptiska vikublaðnum Al-Ahram er eitt ser-innlegg við heitinum EGYPT 2010 BID - Having a Ball. Áður hevur blaðið hýst lýsingaherferðini fyri hesum avbjóðandi átakinum, ið tað veruliga má kallast - at fáa HM-kappingina til Egyptalands. Í serblaðnum er m.a. ein grein um, hvussu egyptiska kvinnulandsliðið bleiv stovnað og reisti seg - liðið kvalifiseraði seg til Afrika Meistaraskapi fyri fyrstu ferð við einum 1-0 sigri á Uganda fyri nøkrum árum síðan. Sagt verður at útlitini fyri kvinnufótbólti eru bjartari nú, enn tey vóru í 1990´unum. Nú er viðurskiftini betur skipaði, eftir at FIFA fekk eyguni upp fyri egyptiskum kvinnufótbólti og stuðlaði í stovnanini av Egyptian Women´s Football Federation.

Aftur til kavaklædda Danmark og nýggja árið. Nú royndirnar eru farnar aftur um bak, byrjar skúlaárið á Københavns Universitet aftur av álvara, so best mann vera at sleppa sær...



# Heidi er klár at fara til verka

**Nýggja tingkvinnan hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðstreymi, Heidi Petersen, ætlar at nýta tingsessin til at gera vart við tey mál, sum hava uppiborið eina betri lagnu. Kemur Tjóðveldisflokkurin í andstøðu, ætlar Heidi at virka fyri einum konstruktivum andstøðupolitikki**



NÝGGJ LØGTINGSKVINNA

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hon er saman við javnaðartingmanninum, John Johannessen, einasta nýggja andlitið í føroyskum politikki eftir løgtingsvalið 20. januar. Hon er rólig av lyndi og veit hvat hon vil. Saman við Annitu á Fríðriksmørk og Lisbeth L. Petersen er hon einasta kvinnuróddin á tingi.

Sum nýggj tingkvinna hevur hon longu gjørt vart við seg við lesarabrævi um kvinnuhandil í Føroyum.

Vit tosa um kvívíkingin, Heidi Petersen, sum seinastu 20 árini hevur búð í Vestmanna. Í hennara fyrstu roynd sum valevni fyri Tjóðveldisflokkin, eydnaðist tað Heidi at vinna sæti á tingi. Við 203 persónligum atkvøðum vann Heidi á Nikláa Petersen um at gerast tjóðveldisumboðið í Norðstreymi.

Høvuðspersónurin dylir ikki fyri, at tingsessur skal nýtast til at gera vart við tey øki, sum eftir hennara meting hava uppiborið betri lagnu. Heidi Petersen hevur longu tikið avgerðina um at taka farloyvi úr starvinum sum lærari í Vestmanna skúla, so øll orkan verður nýtt til tingarbeiðið komandi valskeið.

### Einki grenj

Í skrivandi løtu bendir nógv á, at Tjóðveldisflokkurin, eftir seks ár í samgongu, má sláa seg til tols við at vera í andstøðu komandi valskeið. Nógv fólk hava gjøgnum tíðina umboðað Føroya Løgting uttan at gera stórvegis háva burturúr sær. Heidi slær fast, at sjálvt um Tjóðveldisflokkurin skuldi enda í andstøðu, so ætlar hon at virka fyri uppbyggjandi politikki.

– Eg vil sjálvsagt heldur vera partur av eini samgongu, men sum støðan er í løtuni, bendir ikki nógv á tað. Tað er lættari at fáa ting ígjøgnum í eini samgongu, men koma vit í andstøðu, ætli eg kortini at arbeiða konstruktivt. Man kann ikki vera tað betjentur at sita á tingi og fáa fulla løn og so bara sita og grenja, sigur Heidi Petersen.

Nýggja tingkvinnan í Tjóðveldisflokkinum hevur lagt hart út. Í vikuni hava tjóðveldistingkvinnurnar Heidi Petersen og Annita á Fríðriksmørk verið frammi í fjølmiðlunum um kvinnuhandil í Føroyum.

Heidi sigur seg vilja virka fyri einum samhaldsføstum samfelag, har teir breiðastu herðarnir bera tyngstu byrðarnar. Aðalmálini skulu røkkast gjøgnum politikkin hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Vit mugu halda fast við tað, sum Tjóðveldisflokkurin er byrjaður upp á. Her hugsi eg millum annað um íbúðir til heimleys, skúlatilboð til brekað og sambýli til sinnisveik. Hetta er bert byrjanin, og hesar raðfestingar eiga at halda fram, greiðir hon frá.

### Spennandi valstríð

Dagin eftir løgtingsvalið skrivaði Dimmalætting, at Heidi Petersen kom sá og sigraði. Hetta er so satt sum er tað sagt, tí valið 20. januar var hennara fyrsta sum valevni fyri Tjóðveldisflokkin. At hon í síni fyrstu roynd skuldi vinna sæti á tingi kom rættiliga óvart á hana. Umboðið hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðstreymi seinasta valskeið, Niklái Petersen, fekk heili 225 persónligar atkvøður á valinum í 2002, men kortini eydnaðist tað Heidi at enda omaná á løgtingsvalinum 20. januar.

Spurd, um hvør hennara styrki var í valstríðnum, svarar Heidi, at møguliga kann hennara tilknýtið til bæði Kvívík og Vestmanna hava hjálpt henni.

– Satt at siga dugi eg ikki at siga ítøkiligt, hvat orsøkin er til, at eg varð vald. Fólk vilja kanska síggja nýggj fólk á tingi og vilja tí royna meg, greiðir hon frá.

Hon leggur í sama viðfangi afturat, at tað var ikki bert hennara persónur, sum vann tingsessin fyri Tjóðveldisflokkinum í Norðsteymi. Hon vísir á, at øll valevnini saman við limunum hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðstreymi tóku eitt megnar tak undir øllum valstríðnum, og tey hava øll uppiborið eitt stórt herðaklapp.

### Partur av kvinnulistanum

Heidi Petersen sigur seg altíð hava verið tjóðveldiskvinnu um ein háls.

– Eg komi úr Kvívík, og har ert tú antin tjóðveldisfólk ella sambandsfólk. Vit diskuteraðu dúgliga fyri og ímóti loysing. Diskussiónirnar vóru ógvuliga spennandi, og vit royndu at sannføra um, at einar frælsar Føroyar var tað rætta, sigur Heidi Petersen

Hóast hon altíð hevur kent seg sum tjóðveldisfólk, gjørdist Heidi ikki virkin í flokkinum fyrr enn á løgtingsvalinum í 1998. Undir valinum í 2002 var hon formaður í Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag, men stillaði ikki sjálv upp.

Heidi Petersen er kortini ikki óroynd í politikki. Hon var ein av kvinnunum, sum vóru við at stovna sonevnda kvinnulistan í Vestmanna til kommunuvalið í 1988.

– Vit vildu hava øðrvísi raðfestingar í Vestmanna. Nógvar útbyggingar vóru, men tær komu ikki barnafamiljunum og teimum eldru til góðar. Vit vildu raðfesta tey økini hægri, og tí gjørdu vit ein kvinnulista, greiðir hon frá.

Nýggi tinglimurin hjá Tjóðveldisflokkinum gjørdist kortini ikki drúgv í kommunupolitikki. Hon sat bert ta eina skeiðið. Heidi greiðir frá, at børnini vóru smá og maðurin sigldi úti, og tískil hevði hon ikki stundir til politikk.

### Fosturtøkumál yvirtakast

Heidi Petersen sigur seg altíð hava fylgt væl við í føroyskum samfelagsviðurskiftum. Áðrenn hon fór í kommunupolitikk, vóru tað serliga tey sonevndu kvinnuøkini, sum høvdu hennara stóra áhuga.

Undir valstríðnum í ár varð fosturtøkumál nógv umrøtt. Heidi Petersen hevur eina greiða áskoðan, hvussu fosturtøkumálið skal skipast, men hon heldur, at málið fekk eina óvirðiliga viðgerð undir valstríðnum

– Eg haldi, tað er langt úti at draga fosturtøkumálið fram og niðurgera tær kvinnur, sum hava fingið fosturtøku ístaðin fyri at rætta teimum hjálpandi hond.

Hon er sannførd um, at rættasta loysnin á fosturtøkumálinum er, at føroyingar yvirtaka økið. Núverandi lóggáva er frá 1956 og í Føroyum er eitt sindur ógreitt, hvussu lógin skal lesast. Heidi Petersen heldur ikki, at danir framhaldandi skulu umsita økið fyri føroyingar. Hon heldur, at føroyingar skulu orða eina lóggávu sum hóskar til okkara fatan og tíð.

– Galdandi lóggáva er for lunkað, og politikkararnir lata bert læknunum ábyrgdina. Vit eiga at gera púra greiðar orðingar í Føroyum, so at læknarnir vita, hvat teir skulu fyrihalda seg til, sigur hon at enda.

**Fakta**

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Heidi Petersen |
| **Fødd:** | 1959 |
| **Gift:** | 1979 við Tummas Christophersen |
| **Børn:** | Barbara 23, Durita 18, Katrin 14, Hanus 8 |
| **Politisk søga:** | Í Vestmanna Bygdarráð frá 1988-92, formaður í Norðurstreymoyar Tjóðveldisfelag 2002, Aðalstjórnarformaður Tjóðveldisfloksins 2002 og tingkvinna fyri Tjóðveldisflokkin 2004- |
| **Bústaður:** | Vestmanna |
| **Borgarliga starv:** | Lærari |